## Jólasøla í Tilhaldinum

Í hesum døgum er afturvendandi jólasølan í kjallaranum í Tilhaldinum. Á jólasøluni fært tú millum annað vælumtøktu hitapúturnar, Hanussarsúltitoy og mangt annað. Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið í Tilhaldinum, har inngongdin er úr Grasagarði. Opið 24.-28. november millum kl.16 og 20. Tann 29. november kl. 10–14.



## 16 ár og koyrdi fullur

Sunnunáttina varð ein 16 ára gamal drongur tikin fyri at koyra fullur. Orsøkin til, at bilurin varð tikin av løgregluni, er, at løgreglumenninir kendu bilin aftur frá í summar, tá ein 15 ára gamal varð tikin í sama bili. Hesin, ið nú koyrdi á Norðara ringvegi var ein vinmaður hjá 15 ára gamla dronginum, ið varð tikin í summar. Kanska hava hesir ungu dreingir lært, at tað er ein orsøk til, ikki at seta seg í bilin. Hesin 16 ára gamli drongurin var ein av fimm, ið eru tikin um vikuskiftið fyri rúsdrekkakoyring.

# Fíggjarmálaráðharrin seinkaði flogfarinum



**Sunnudagin skuldi eitt flogfar fara úr Keypmannahavn klokkan 18.00. Flogfarið fór ikki til tíðina, tí bíðað var eftir einum ferðafólki, sum sagt varð í hátalarunum. Persónurin, ið flogfarið bíðaði eftir, vísti seg at vera Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri**

ÍSLANDSTÚRUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sambært einum ferðafólki umborð á RC 457, varð flogfarið seinka eitt korter, tí ein ávísur ferðamaður ikki var komin. Tá tíð var gingin kom seinasti maðurin umborð. Jóannes Eidesgaard var seinasti maðurin umborð, og tá hann var komin fór flogfarið uppfrá. So tað var uttan iva fíggjarmálaráðharrin bíðað var eftir, sambært ferðafólkinum, sosialurin hevur tosað við.

Sambært Atlantsflogi var veruliga bíðitíðin í Kastrup bert átta minuttir. Tey vilja ikki upplýsa, um tað var hetta flogfarið, sum Jóannes Eidesgaard var við, men eftir øllum at døma er talan um hetta flogfar.

Sama ferðafólk greiðir eisini frá, at løgmaður ikki var ófantaligur á nakran hátt, men at ein annar ferðamaður royndi at provokera løgmann.

### Løgmaður argast

- Persónliga dámar mær ikki at bíða eftir flogfarinum. Tað er ótrúliga óheppið, at Jóannes Eidesgaard eftir øllum at døma var ov seinur, men tað er sum so onki ólógligt í, at verða ov seinur til eitt flogfar, sigur Kaj Leo Johannesen. Sum leggur afturat, at hann ikki hevur spurt fíggjarmála-ráðharran, hví hann var ov seinur, men hann metir, at hetta er nakað Jóannes Eidesgaard sjálvur má greiða frá. Tað skilst eisini á løgmanni, at hann metir tað vera óheppið, at flogfari skal bíða eftir einum landsstýrisfólki, og tað er ikki nakað hann heldur vera hóskandi fyri ein føroyskan ministara, sum løgmaður tekur til. Løgmaður sigur eisini, at hann ikki fer at spyrja ein landsstýrismann, um hann er ávirkaður í flúgvarinum, men at tað er nakað hann gongur útfrá, at ongin landsstýrismaður ger.

- Eg taki tað fyri givið at landsstýrisfólk ikki eru sjónliga ávirkaði, sigur løgmaður.

### Fíggjarmálaráðharrin burtur

Sosialurin hevur til fánýtis roynt at fáa fatur á fíggjarmálaráðharranum í allan morgun, men hann er eftir øllum at døma ikki at fáa fatur á, tí hann var ikki at finna. Hvørki uppi ella niðri. Hann hevur tó sent eini boð, har hann sigur, at hann ikki vil úttala seg meira alment um málið. Hann hevur tí í skrivi 0váttað, at hann var orsøkin til, at flogfarið varð seinkað.

## Jóannes hevði smakkað sær á

**Sjálvt um Jørgen Niclasen ikki hevur hug at gera stórvegis viðmerkingar til døgurðan hjá starvssystir síni, váttar hann, at Jóannes Eidesgaard hevði smakkað sær á, áðrenn hann kom til borðhaldið**

ÍSLANDSTÚRUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið gjørt burtur úr málinum um døgurðan, sum íslendski uttanríkismálaráðharrin bjóðaði til leygarkvøldið, har eisini Jóannes Eidesgaard var boðin við

Ein teirra, sum kann varpa ljós á hendingina í Íslandi leygardagin, er uttanríkismálaráðharrin, Jørgen Niclasen. Men hann hevur ikki hug at gera stórvegis viðmerkingar.

- Eg kann bara siga, at fíggjarmálaráðharrin hevði smakkað sær á áðrenn hann kom, hvussu nógv kann eg av góðum orsøkum einki siga um. Men døgurðin gekk sum hann skjuldi, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur víðari, at talan var um ein døgurða, har íslendski uttanríkismálaráðharrin bjóðaði føroyska starvsbróðuri sínum til døgurða, og alt fór fram sum vant.

-Íslendskiuttanríkismálaráðharrin helt eina røðu og tað gjørdi eg eisini. Og tað var tað. Jóannes Eidesgaard hevði onga almenna uppgávu til døgurðan, og var bert boðin við, tí hann nú var í Íslandi, er góður vinur við Ingibjørg Sólún Gisladóttir, eins og tey eru limir í brøðraflokkum, sigur Jørgen Niclasen.

So sambært føroyska uttanríkismálaráðharranum var tað einki at skriva heim um, og døgurðin fór fram so sum slíkir døgurðar nú einaferð fara fram.

### Fyri tingfund

Málið um tann nógv umrødda Íslands-døgurðan hjá Jóannesi Eidesgaard, landsstýrismanni kemur nú á tingborð.

Á tingfundinum í morgin fertjóðveldismaðurin Sjúrður Skaale at spyrja Kaj Leo Johannesen, løgmann, um tað kann góðtakast, at landsstýrisfólk eru ávirkað av rúsdrekka, tá tey umboða Føroyar í almennum ørindum uttanlands.

Sjúrður Skaale vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin eftir løgmansins tykki umsat sítt málsøki á fullgóðan hátt, tá hann møtti ávirkaður til ein døgurða hjá íslendsku stjórnini. At enda vil tingmaðurin hava at vita, um løgmaður fer at taka nakað stig í sambandi við málið.

Jóannes Eidesgaard hevur avsannað tíðindini úr Íslandi um, at hann var sjónliga ávirkaður av rúsdrekka, tá hann kom til døruroða, sum íslendska stjórnin skipaði fyri. Hann hevur hinvegin viðgingið, at hann hevði drukkið, áðrenn hann fór til borðs, og at hann drakk undir døgurðanum.

# Løgmaður ger onki við íslandstúr

**Hóast nógvar søgur hava gingið um, hvørt fíggjarmálaráðharrin hevur borið seg rætt at til ein døgverða í Íslandi seinasta leygardag, so ætlar Kaj Leo Johannesen, løgmaður, ikki at kanna málið nærri. – Eg havi fult álit á mínum landsstýrisfólkum, til tað øvuta er prógvað, sigur løgmaður**

ÍSLANDSTÚRUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast nógvar ymiskar frágreiðingar eru til ein ávísan døgverða í Íslandi seinasta leygardag, har fíggjarmálaráðharrin luttók, og ónevndar keldur hjá Dimmalætting greiða frá, at landsstýrismaðurin var »mega skid«, kom og seinur til døgverðan og var pínligur sum heild. Metir løgmaður seg ikki skula gera nakað meira við málið.

- Hetta er sjálvandi ein keðilig sak, sum hevur stungið seg upp, men eg havi tikið frágreiðingina hjá Jóannesei Eidesgaard til eftirtektar, sigur løgmaður. Hann leggur afturat, at hann hevði tosað við Jørgen Niclasen um málið, og at sambært honum er alt fari fram, sum tað vanliga ger til ein tílíkan almennan døgverða.

- Eg haldi ikki tað er rímiligt, at eg skal spyrja øll 25 fólkini í selskapinum, hvussu tey hava upplivað Jóannes Eidesgaard til døgverðan, tí tann dagin eg ikki havi fult álit á fíggjarmálaráðharranum, so er tað starvið rokið, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann metir eisini, at landsstýrisfólk, til eina og hvørja tíð skulu uppføra seg fyrimyndarliga. Júst á sama hátt sum ítróttarfólk.

Kaj Leo Johannesen metir heldur ikki, at hann skal taka nakra støðu til, hvat er fari fram og ikki tí hann metir seg bert hava frágreiðingarnar hjá fíggjarmálaráðharranum og uttanríkisráðharranum.

- Eg var ikki har sjálvur. Eg skal ikki úttala meg meira um tað, tí tað er so skjótt at rópa upp um alt møguligt. So eg haldi hetta vera eina óhepna støðu, men eg kann illa úttala meg um framtíðina, greiðir Kaj Leo Johannesen frá. Hann sigur eisini, at hann ikki vónar, at hetta fær avleiðingar fyri politiska stevið, ið hann annars metir vera gott.